# ítróttur

Nr. 130 • leygardagur • 12. juli 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

## ÍA vil leingja sáttmálan

**Íslendska felagið vil fegið leingja sáttmálan við Julian Johnsson, men miðvallarin dregur eitt sindur á**

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*



*– Eg var framvegis svangur eftir nýggjum avbjóðingum, og tí valdi eg at fara til Íslands at spæla, sigur Julian Johnsson um skiftið úr B36 til ÍA*

*Savnsmynd*

Tað hevur gingið væl hjá Juliani Johnssyni í Íslandi. So væl at íslendska felagið ÍA vil leingja sáttmálan við føroysku miðvallarkempuna.

– Vit skulu samráðast aftur í næstu viku. Teir vilja gera ein tvey ára sáttmála, men eg havi enn ikki gjørt av, hvat eg fari at svara teimum, møguliga blívur tað bara til ein eitt ára sáttmála, sigur Julian Johsson úr Íslandi.

Julian Johnsson hevur í løtuni ein fyribils sáttmála, sum rennur hetta kappingarárið út. Í næstu viku skulu ÍA og Julian so finna fram til eina loysn, sum báðir partar kunnu vera nøgdir við.

### Øðrvísi fótbóltur

Julian hevur nú verið í Íslandi í ein góðan mánað. Hann fór til Íslands, beint eftir at føroyska landsliðið spældi ímóti Týsklandi tann 11. juni, og hann hevur spælt líka síðani.

– Tað verður spælt øðrvísi her enn í Føroyum. Í íslendskum fótbólti verður tað spælt nógv meira við langum bóltum, tí kann tað tykjast sum um leikferðin er hægri, sigur Julian.

Hann leggur tó afturat, at tá verjuleikarar spæla ein langan bólt fram í álopið ístaðinfyri ein stuttan bólt niðan á miðvøllin, skalt tú renna nógv meira óneyðugt.

– Ítróttarliga hevur tað annars gingið væl, og eg eri nú komin uppá pláss her á Akranesi, sigur Julian. Hann býr beint nú á einum gistingarhúsi, men hetta er bert ein fyrbils loysn.

Vant verður frá tveir tímar um dagin frá klokkan 17 til 19. Allir leikararnir hava sáttmála, men teir flestu arbeiða eisini við síðuna av.

Fyrsta dystin sat hann á beinkinum, men tá var hann ikki meira enn komin til landið. Síðani hevur ÍA spælt fimm dystir, og Julian hevur verið við frá byrjan í øllum fimm. Úrtøkan hevur verið misjøvn: Tveir sigrar, tveir javnleikir og eitt tap.

ÍA hevði tørv á einum sterkum spælara, sum kundi vinna nakrar bóltar, og Julian hevur vunnið sær fast pláss á miðvøllinum í eini 4-3-3 skipan.

Níggju umfør eru spæld í íslendsku landskappingini, og í skrivandi stund liggja Julian og hinir av Akranesi á triðaftasta plássi við tíggju stigum. Tað er tó sera tætt millum øll liðini, tí bert átta stig eru upp til fremsta liðið, sum Þróttur við átjan stigum. Tíggju lið eru í fremstu deildini.

Hóskvøldið spældi ÍA á heimavølli ímóti ÍBV av Vestmannaoyggjunum, og tað endaði við 3-0 sigri til ÍBV. Hetta var ein dyggur smeitur hjá Juliani og teimum, tí teir ætlaðu sær við einum sigri at nærkast oddinum. ÍA spældi tó allan seinna hálvleik við tíggju monnum. Julian spældi sum vant allar níti minuttirnar.

ÍA er framvegis við í steypakappingini, har komið er fram til fjórðingsfinalurnar.

### Var svangur

Eftir at Julian hevði roynt seg sum yrkisleikara í Kongsvinger og Sogndal í Noregi og síðani Hull City í Onglandi, valdi hann at koma heimaftur á klettarnar, og hann fór at spæla við havnarfelagnum B36. Men hví fór hann nú avstað aftur?

– Eg haldi, at eg framvegis var svangur eftir nýggjum avbjóðingum. Eg vildi royna okkurt afturat, áðrenn skógvarnir verða lagdir á hillina.

– Eg var eisini farin í gongd við eina útbúgving, sum kanska ikki var júst tað rætta fyri meg, og eg visti ikki ordiliga, hvat eg skuldi finna uppá. Tá so hesin møguleikin gjørdist veruleiki, valdi eg at taka av, sigur Julian Johnsson.

Um ósemjuna við B36 um skiftið til ÍA hevur Julian ongar serligar viðmerkingar.

– Har var ein ósemja millum meg og B36, men meira havi eg ikki at siga um tað, sigur Julian at enda.

## Trygd fyri fleiri undankappingardystum

**UEFA leggur upp til, at fleiri lið skulu vera í hvørjum undankappingarbólkinum til EM og HM, og tað verður eisini skotið upp, at tað skulu spælast fleiri dystir í UEFA Cup**

FØROYAR Í ALTJÓÐA FÓTBÓLTI
*Jóannes Hansen*

Í framtíðini skal føroyska fótbóltslandsliðið spæla fleiri landsdystir, enn tað hevur gjørt tey seinnu árini. Og talan skal verða um fleiri týdningarmiklar undankappingardystir, sum skulu spælast í staðin fyri vinardystirnar, sum tað viðhvørt hevur eydnast FSF at fáa avtalur um, og sum tað støðugt verður arbeitt við at fáa avtalur um.

Tað er uppskotið um broytingar í bólkasamansetingunum til EM og HM undankappingar, sum UEFA legði á borðið fríggjadagin, ið letur upp fyri fleiri týdningarmiklum fótbóltslandsdystum. Treytin fyri at uppskotið skal gerast til veruleika er, at FIFA tekur undir við tí.

UEFA uppskotið ber við sær, at tað í undankappingini til HM endaspælið í 2006 skulu vera átta bólkar í Europa. Í trimum bólkum ætlar UEFA, at luttakaratalið skal verða sjey, og í fimm bólkum skulu tað verða seks luttakarar. Tað vil við øðrum orðum siga, at Føroyum fara í næstu HM undankappingini at verða tryggjaðar í hvussu so er tíggju undankappingardystir og kanska tólv. Í EM undankappingini, sum verður liðug í heyst, skulu Føroyar spæla átta dystir.

Ætlanin hjá UEFA fyri EM undankappingina til EM endaspælið í 2008 er, at tey 50 europeisku londini skulu flokkast í ein bólk við átta luttakarum og í seks bólkar við sjey luttakarum. Tað vil siga, at dystartalið tá ivaleyst verður tólv og kanska fjúrtan. Føroyar hava ongantíð áður verið í bólkaspæli, har tað hava verið fleiri enn tíggju dystir.

UEFA ætlar, at til HM endaspælið í 2006 skulu teir átta bólkavinnararnir sleppa og tvey tey bestu tveyara londini. Harafturat skulu hinir seks tveyararnir í play off, sum teir siga, gera av, hvørjir teir tríggir síðstu luttakararnir skulu vera. Til EM endaspælið í 2008 er ætlanin, at teir átta bólkavinnararnir og teir átta tveyararnir skulu kvalifisera seg beinleiðis.

### Fleiri í Europa Cup

Higartil hava føroysku feløgini, sum hava tikið lut í Europa Cup, ongantíð megnað at spælt seg víðari úr fyrsta innleiðandi umfarinum. Vánirnar fyri at tað skal eydnast næstu árini tykjast ikki vera serliga stórar, og tí verður neyvan talan um stórvegis broytingar fyri føroysku feløgini. Men nýggju ætlanirnar hjá UEFA gloppa dyrnar fyri, at talan skal gerast um nógv fleiri dystir hjá feløgunum, sum megna at spæla seg víðari úr fyrsta innleiðandi umfarinum.

Ætlanin hjá UEFA gongur út uppá, at tað frá á sumri í 2004 verður soleiðis, at tað í Cup umfari fyrst verður gjørt av, hvørji 40 av 80 feløgum skulu víðari í kappingini. Hesi fjøruti feløgini skulu so flokkast í átta bólkar við fimm feløgum í hvørjum. Hesi skulu spæla øll ímóti øllum á heimavølli og útivølli. Tað vil siga, at dystartalið hjá teimum verður tveir dystir í fyrsta innleiðandi umfarinum og so átta í bólkaumfarinum.

Trý tey bestu feløgini í hvørjum bólki sleppa víðari í Cup umfar saman við átta teimum vánaligastu í fyrsta bólkaumfarinum í europeisku meistarakappingini. Hesi 32 skulu so spæla víðari í Cup kapping.



## Spenningurin er stórur í Sandavági

**Í vertsbygdini fyri Vestanstevnuni halda tey umstøðurnar vera nóg góðar at rógva. Millum kappróðrarfólk er nógv tos undan stevnuni, og í RSF hava teir í vikuni kent seg noyddar at skorið út í papp, hvussu framferðarhátturin er, tá ið tað ræður um ivaveður, útsetingar og avlýsingar**

KAPPRÓÐUR Á VESTANSTEVNU
*Jóannes Hansen*



*Í FM kappingini eru rættuliga góðir møguleikar fyri, at í hvussu so er tvær av teimum seks kappingunum verða avgjørdar í dag. Gongurólvur við kvinnum, sum myndin vísir, og Ørvur liggja til longu í dag at vinna kappingarnar fyri ávikavíst 6–mannafør við kvinnum og 8–mannafør*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Tað valdast um eyga, sum sær, plagar at verða tikið til. At orðatakið er beinrakið, ber tosið undan kappróðrinum á Vestanstevnuni í Sandavági boð um. Millum kappróðrarfólk verður tosað og á heimasíðuni hjá Klaksvíkar Róðrarfelag skrivað um, at tað eru ikki nóg góðar umstøður at rógva kapp í Sandavági, og at tað ítróttarliga virðið í róðrinum er ikki, sum tað eigur at vera.

Teir í Róðrarsambandi Føroya tykjast fylgja við og lesa og lurta. Í hvussu so er hava teir undan Vestanstevnuni mett tað vera neyðugt at senda skriv til feløgini, har tað verður staðfest, hvussu mannagongdin er, tá ið illverður ella ivaveður er, og tað ikki soleiðis beinanvegin ber til at rógva til ásettu tíðina.

Í skrivinum verður staðfest, at tað er heimilað høvuðsdómaranum at útseta róðurin í ein ella fleiri tímar. At tað er heimilað at útseta róðurin til sunnudagin, at tað er heimilað at flyta róðurin til Miðvágs sunnudagin, og at tað er heimilað at flyta róðurin til Miðvágs leygardagin, um tað leygardagin ikki eru líkindi at rógva á Sandavági, og um veðurvánirnar siga, at tað heldur ikki sunnudagin kunnu roknast við at verða líkindi at rógva í Sandavági.

Róðrarsambandið leggur afturat, at høvuðsdómarin skal ráðføra seg við Róðrarsambandið og við stevnufyrireikararnar, áðrenn endalig støða verður tikin til, um róðurin vegna veður skal útsetast ella flytast.

– Vit mugu hugsa um sjálva kappingina og um trygdina og umstøðurnar sum heild hjá teimum, sum rógva. Eg róði sjálvur í Sandavági í 1979. Tá var veðrið so mikið vánaligt, at tað var hættisligt. Tá var neyðugt hjá rógvarunum at verja seg ímóti veðrinum, og tað var vandamikið, tí nógvar av manningunum dugdu ikki at handfara bátarnar. Í eina sovorna støðu koma vit ikki hesa ferð. Um umstøðurnar vera so vánaligar, so verður róðurin heilt víst útsettur ella fluttur, staðfestir formaðurin í Róðrarsambaninum Hannis Joensen.

Nógvu teir seinastu dagarnar hevur hann ligið lágt. Tað hevði verið betri fyri róðrarlíkindini í Sandavági, um talan hevði verið um høgætt. Fyri seinnapartin leygardagin hevur veðurmaðurin sagt útsynning og útsynning sunnan. Fyrst hevur hann sagt vindmegi 5–8, og so skal hann seinni á degnum vaksa til 8–13. Veðurvánirnar kundu havt verið betri, men tað hevði verið verri, um hann hevði verið landssynningur, siga tey í Sandavági.

### Somu treytir sum hini

Eftir kappróðurin í Sandavági í 1999 filtust fleiri á, at tað skuldu vera plaseringarnar í feltinum, sum gjørdu av, hvør bátur vann og hjá hvørjum tað royndist verri.

Hansina á Plógv hevur fyri Sandavágs Ítróttarfelag høvuðsábyrgdina av kappróðrinum í Sandavági. Hon kennir væl til tosið um Sandavág sum kappróðrarvág.

– Tá ið Sandavágur er kappróðrarvág, so má tað vera undir somu treytum sum onnur pláss. Vit hava bæði í ár og undanfarin ár sæð, at tað í fleiri plássum kann hava týdning fyri úrslitið, hvar bátarnir liggja í feltinum, og soleiðis kann tað eisini undir ávísum umstøðum vera í Sandavági. Tað er væl tí, at bestu bátarnir vanliga liggja í miðjuni og undir liðini á hvørjum øðrum. Sjálvandi skulu vit ganga undir somu krøv sum onnur róðrarøki, men tað er órímuligt at seta størri krøv til okkara, enn tað verða sett aðra staðni.

Kemur tað illa við, um tað verður gjørt av, at tað skal rógvast í Miðvági og ikki í Sandavági?

– Sjálvandi kemur tað illa við. Vit hava fyrireikað okkum so væl, sum tað ber til, men fyrireikingarnar eru gjørdar út frá, at tað skal rógvast í Sandavági. Tað ber til at rógva í Miðvági, men tað verður ikki tað sama, og tað fer at hava stóra ávirkan á stevnuna í Sandavági.

Hvussu tá?

– Vit kenna hetta dagliga. Tá ið vit venja í Miðvági, sum vit annars á so mongum økjum hava gott samband við, so er áhugin fyri kappróðrinum her hjá okkum verri enn so eins stórur, sum hann er, tá ið vit venja í Sandavági, og tað ber til hjá bygdafólkunum at fylgja við úr vindeygunum. Tað verður nógv truplari at fáa fólkið til Sandavágs, um róðurin verður í Miðvági.

Men skilir tú tað, um tað verður mett neyðugt at flyta til Miðvágs?

– Sum sagt, so haldi eg, at vit skulu vigast á somu vektini, sum øll hini róðrarøkini. Um spurningurin verður um trygdina, so mugu vit lata okkum lynda at missa róðurin eina ferð heldur enn í allari framtíð at missa kappróðurin í Sandavági, men tað skal altso vera eftir somu meting, sum tað er aðra staðni. Eitt nú vóru líkindini einki serlig í Klaksvík, men tað var eingin vandi fyri trygdini, og so varð róð har, vísir Hansina á Plógv á.

### Miðvágur tekur ímóti

Í Sandavági hava tey rættuliga brynjað seg út at taka ímóti kappróðrarbátunum og fólkinum, og tey hava nógv at hugsa um. Eitt er ILA sjúkan. Í Sandavági er alibrúk, sum ikki er ILA smittað. Tí eru boð givin um, at allir bátarnir, sum skulu rógva, skulu sóttreinsast í Miðvági, og at teir skulu rógva úr Miðvági og til Sandavágs. Eisini bátarnir, sum koma í lastbilum ígjøgnum tunnulin, skulu til Miðvágs at sóttreinsast.

– At bátarnir koma í land av Smyrli í Miðvági og rógva til Sandavágs er einki nýtt. Soleiðis hevur tað verið nógvu tey seinastu árini. At vit vilja hava bátarnar, sum koma í lastbilum, at fara til Miðvágs, kemst bæði av sóttreinsingini, og tí vit vilja hava stóru bilarnar at standa í Miðvági. Annars høvdu teir verið ferðsluni í Sandavági til ov stóran bága, sigur Hansina á Plógv.

Í FM kappingini eru rættuliga góðir møguleikar fyri, at í hvussu so er tvær av teimum seks kappingunum verða avgjørdar í dag. Gongurólvur við kvinnum og Ørvur liggja til longu í dag at vinna kappingarnar fyri ávikavíst 6–mannafør við kvinnum og 8–mannafør. Umframt hesar báðar manningarnar hjá Havnar Róðrarfelag, sum higartil hava vunnið allar fimm róðrarnar, liggja eisini 6–mannafarið Smyril við monnum og 10–mannafarið Eysturoyingur so mikið væl fyri, at teir í dag so at siga kunnu gerast meistarar. Í kappingunum millum 5–mannafør bæði við dreingjum og gentum er spenningurin framvegis so stórur, at tað neyvan verður fyrrenn á Ólavsøku, at kappingin verður avgjørd.

## Startrøðin til FM-róðurin á Vestanstevnu

**Leygardagin 12. juli fara 51 bátsmanningar at rógva sætta FM-róðurin, ið hesa ferð verður á Vestanstevnu í Sandavági. Startrøðin verður henda:**

**Fimmmannafør, dreingir**
1 Royndin Fríða
2 Fípan Fagra 1G
3 Blikur
4 Sílið
5 Havfrúgvin
6 Tjaldrið
7 Junkarin
8 Báran
9 Firvaldur

**Seksmannafør, kvinnur**
1 Fuglfirðingur 1G
2 Lómur 1G
3 Jarnbardur 1G
4 Gongurólvur 1G
5 Páll Fangi 1G
6 Smyril 1G
7 Fortuna

**Fimmmannafør, gentur**
1 Havørnin
2 Beinta
3 Tjaldrið
4 Ørnin
5 Sílið 1G
6 Havfrúgvin 1G
7 Drekin
8 Blikur 2G
9 Firvaldur
10 Junkarin
11 Kollur
12 Tekla
13 Frúgvin

**Seksmannafør, menn**
1 Kollfirðingur
2 Hvessingur
3 Sundabáturin
4 Sølmundur
5 Strálan
6 Páll Fangi
7 Smyril
8 Jarnbardur 1G
9 Lómur
10 Gongurólvur
11 Riddarin
12 Fortuna

**Áttamannafør**
1 Toftabáturin
2 Knørrur G
3 Kvívíkingur
4 Ørvur
5 Argjabáturin
6 Teistin

**Tíggjumannafør**
1 Vestmenningur
2 Nólsoyingur
3 Eysturoyingur
4 Havnarbáturin

## Tjaldur fær nýggjan venjara

Hondbóltsfelagið Tjaldur byrjar eittnýtt skeið í søgu felagsins leygardagin. Kl. 15.00 henda dag verður undirskrivaður sáttmáli ímillum Tjaldur og Michael Jensen.

Við tað at felagið hevur tikið 1. deild menn úr kappingini, og kvinnurnar fara at spæla í 2. deild komandi ár, hevur nevndin gjørt av at seta 36 ára gamla Michael Jensen í starv sum ungdómsvenjara.

Michael Jensen, sum í løtuni er sportsleiðari hjá SGI-Håndbold í Esbjerg, hevur játtað at verða ungdómsvenjari. Sum naka nýtt innan føroyskan hondbólt, kemur hann eisini at útbúgva venjarar, sum verða knýttir at felagnum.

Øll eru vælkomin at støkka inn á gólvi í hølinum hjá Arbeiðarafelagnum Hæddini kl. 15.00 fyri at heilsa nýggja venjaranum.

Í hesum sambandi vilja vit takka Føroya Sparikassa og Com-Data fyri vælvild.

**Vinarliga**
**Hondbóltsfelagið Tjaldur.**
**WWW.tjaldur.fo**